Javnaðarflokkurin:

# Høvuðsvinnan ikki á útlendskar hendur

**Tað ljóðar frá samgonguni, at einskiljing og søla av fyritøkum er komin langt og skal alt gerast púra frítt og uttan avmarkingar. Men Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin, hevur í tinginum loddað dýpið,og væntar sær meirluta fyri uppskoti, ið setir ávísar avmarkingar í samband við sølu av Føroya Fiskavirking**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*



*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, fegnast um, at tað tykist vera meiriluti í løgtinginum fyri einum uppskoti, ið ikki gevur útlendingum ótálmaðar møguleikar í samband við keyp av Føroya Fiskavirking*

Ætlanirnar um einskiljing av størri almennum fyritøkum og sølu eru komnar langt, tó ikki øll tingfólk taka fult undir við ætlanunum, sum í ávísum førum verða mettar at fara ov langt og geva ov frítt spæl, ið ikki er vandaleyst, hóast løgmaður hevur sagt, at løgtingið skal takast við upp á ráð í hvørjum einstøkum føri.

Hetta sjónarmið hevur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard í samband við Føroya Fiskavirking, sum flokkurin metir verða nakað heilt fyri seg, nakað grundleggjadni í føroyskum vinnulívi og búskapi.

– Nú er tað jú ikki landsstýrið, sum varðir av Føroya Fiskavirking, men Framtaksgrunnurin, ið eisini skal selja Føroya Fiskavirking. Fyrrverandi formaðurin, Wilhelm Petersen, eftirlýsti á sinni eisini klárum útmeldingum frá politiskari síðu um, hvørjar ætlanirnar vóru. Stóð tað t.d. útlendingum frítt at keypa, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Útlendingar taka onnur atlit

– Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, setti bólk, ið kom við áliti, sum gav alt púra frítt í sambad við møguliga sølu. Har vóru ongar avmarkingar yvirhøvur. Bjarni Djurholm tók undir við hesum sjónarmiði, og av tí at hetta var í tráð við vinnupolitikk landsstýrisins, legði hann ikki álitið fyri tingið, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Vit eru ikki sand í, at ongar avmarkingar skulu vera, tá tað snýr seg um Føroya Fiskavirking og at útlendingar ótálmaðir kunnu koma inn. Vit eru ikki samd í prinsippinum. Tí útlendingar taka onnur atlit og hugsa sjálvsagt um, hvat tænir teirra áhugamálum best. T.d. hevur Eimskip verið nevnt sum møguligur keypari og avleiðingarnar kunnu verða so nógvar. T.d. at vit eisini missa allan flutningin, minnir formaður Javnaðarfloksins á.

### Serstakt við Fiskavirking

– Tað er nú einaferð nakað serstakt, tá vit tosa um Føroya Fislavirkng. Tað er ikki tað sama, sum tá vit siga, at vit loyva útlendskum kapitali í føroyska vinnu. Hetta er meira grundleggjandi. Tí vóru vit eisini spent upp, hvat tingfólk, samgongulimir, søgdu til ótálmaðu ætlanirnar og loddaði eg tí dýpið fyri, hvat fólk hildu um avmarkingar ella púra frítt spæl. Fleiri søgdu seg ganga inn fyri avmarkingum, eisini samgongulimir og t.d. Torbjørn Jacobsen og Poul Michelsen lótu hetta koma fram.

– Alt bendir tí á, at eitt uppskot um ávísar avmarkingar fær meirluta í tinginum. Í grundini er tað bara ein spurnigur um, hvør skal taka stig til uppskotið, men ger eingin annar tað, so fer Javnaðarflokkurin at taka stigið og væntandi fæst meirluti, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Støðan nú er í grundini tann, at vit kunnu vakna í morgin og Fiskavirking er selt á útlendskar hendur. Hetta eru virkir ella ein fyritøka, sum hava bart kreppuárini av sær og sum eru saneraði. Hví selja øðrum fyri saneringsprís? Og so mugu vit ikki gloyma avleiðingarnar, sum slíkt kann fáa fyri útjaðaran, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Vit tosa um grundleggjandi viðurskifti og um hjartað í føroyskum vinnulívið. Puntkið, ið alt melur um og um okkara fiskitilfeingi, so her má farast varliga fram og heilt vandaleyst er ikki ótálmað at lata alt fara á útlendskar hendur, metir Jóannes Eidesgaard, sum fegnast um, at tað sær út til, at meirluti fæst í tinginum fyri uppskoti, ið setir ávísar avmarkingar hesum viðvíkjandi.

– Enn torur hann tó ikki at seta tøl á ella koma nærri inn á, hvat slíkt uppskot kemur at ljóða uppá viðvíkjandi prosentpørtum í eigaraviðurskiftum, men at tingfólk ikki vilja lata alt fara ótálmað av føroyskum hondum er hann fegin um og so kunnu smálutirnir í uppskotinum koma seinni, tá tingið kemur saman aftur í heyst.

# Sólarmagn á kórstevnu í Waterord

**Í samband við kórstevnu í írska býnum Waterford 7. til 10. august, er kórið, Sólarmagn á kórferð í Írlandi**

KÓR
*Dagfinn Olsen*

Fróði Sandoy er kórleiðari, og kórsangararnir, sum eru 24 í tali, hava heimstað ella tilknýti til Kirkjubøar kommunu. Tó eru eisini tveir sangara úr Fuglafirði við á ferðini. Farið varð úr Føroyum umvegis London hósdagin, og ferðin varðar í eina viku.

Kórið syngur bæði nýtímans og eldri meira klassiskan kórtónleik. Av føroyska tilfarinum kunnu nevnast verk eftir Bjarna Restorff, Paula í Sandagerði, Sunnleif Rasmussen og Kára Bæk. Eisini sálmar, millum annað eftir Kingo, og okkurt kvæði eru á skránni. Umframt føroysk verk, syngur kórið eisini norskan, íslendskan, franskan og russiskan (Rachmaninov) tónleik.





# Mary er góðkend



*Mary Donaldson úr Tasmania er vorðin til ta einastu einu hjá Krúnprinsinum. Hon hevur eisini fingið blástemplið frá Drotning Margrethu*
*Mynd: Reuters*

**Mary Donaldson úr Tasmania hevur fingið blástemplið frá Drotning Margrethu. – Hon verður ein góð svigardóttir, sigur hennara kongaliga hátign sambært danska blaðnum BT. Nógvar gitingar eru nú um nær trúlovingin verður**

KONGALIGT
*Ingrid Bjarnastein*

Nú hevur krúnprinsurin funnið sína einastu einu. Frederik og Mary Donaldson hava hildið saman sambært donskum fjølmiðlum í yvir trý ár, og nú vænta danir eina kongaliga trúloving.

Mary Donaldson úr Tasmania hevur eisini fingið blástemplið frá Drotning Margrethu. Sjálvt um hennara kongaliga hátign ikki er so tíðindafróð tá tað kemur til unnustuna hjá soninum, so sigur hon sambært danska blaðnum BT, at Mary uttan iva er ein góð svigardóttir.

### Gitingar

Donsku fjølmiðlarnir gera nógv burturúr gitingunum um, nær ein kongalig trúloving verður á skránni.

Ein trúloving kann ikki verða almenn fyrr enn Margretha Drotning hevur kunnað stjórnina og forsætisráðharran um trúlovingarætlarnir, og skal hetta gerast á einum ríkisráði. Og mest upplagdi dagurin til eitt ríkisráð er tann 8. oktober, so tað er tann fyrsti dagurin, gitt verður.

BT skrivar annars nógv um kongaliga parið, og veit at siga, at fyrstu ferð Frederik og Mary hittust var í september 2000 í Sydney í Avstraliu. Fyrstu ferð Mary var á vitjan í Danmark var á nýttárinum 2001/2002.

14. februar, ella Valentines Day, 2002, váttar danska Kongahúsið fyrstu ferð alment, romansuna millum Frederik og Mary.

Juni sama ár hevði Frederik Mary við til eina samkomu alment fyrstu ferð, og var tað til barnadópin hjá vininum Peter Heering, sum hevði barnadóp.

Nú bíðar alt kongaríkið eftir trúlovingini og brúdleypinum. Men nær tað verður veit ongin enn at siga við vissu.

*Kelda: B T*

# Gestir kappast í dag

**Tónleikabólkurin Gestir skal seinnapartin í dag kappast í Starfighters kappingini á Skanderborg festivalinum niðri í Jútlandi. – Teir hava góðan møguleika at vinna, sigur Jón Tyril úr Grót**

KAPPING
*Ingrid Bjarnastein*



*Gestir skulu í dag, leygardag, kappast í Starfighters kappingini niðri á Skanderborg festivalinum á Jútlandi*

Gestir gjørdust Prix Føroyar vinnarar í ár. Ein av vinningunum var luttøka í Starfighters kappingini, sum er ein partur av Skanderborg festivalinum, sum verður hildin niðri í Jútlandi í hesum døgum.

Og í seinnapartin í dag, leygardag, skulu eysturoyingarnir í eldin. Teir skulu spæla klokkan 17, og eru teir tann seinasti bólkurin, sum er á skránni.

Fleiri av teimum í Grót eru við bólkinum á festivalinum og fylgja við gongdini.

– Eg haldi, at Gestir hava góðan møguleika at vinna. Sólarn hevði verið og lurtað eftir onkrum av hinum bólkunum í gjár, og teir vóru ikki so imponerandi. Men á pappírunum eru teir góðir, so vit fáa at síggja, sigur Jón Tyril úr Grót.

Upplýst verður úr Skanderborg, at umstøðurnar eru góðar.

– Festivalurin er ógvuliga vakur. Tað er ikki uttan grund, at hann verður kallaður »Danmarks smukkeste festival«. Spæliumstøðurnar síggja eisini út til at vera góðar, greiðir Jón frá.

Teir í Gestum eru eisini væl fyri. Fríggjadagin vóru teir koyrdir til Århus ein túr, har teir fingu møguleika at shoppa eitt sindur áðrenn stóru kappingina leygardagin.

# Grind til Norðoyggjar

**Hóskvøldið legði ein grind beinini í Hvannasundi**

GRIND
*Ingrid Bjarnastein*

**Hvannasund:** Í skýmingini hóskvøldið legði ein grind beinini í Hvannasundi. Grindin taldi góðar 150 hval.

Vakthavandi á politistøðini við Sandin í Klaksvík sigur, at tað gekk væl við drápinum, sjálvt um ikki so nógvir bátar vóru við.

Seðlarnir komu út klokkan 10 fríggjamorgunin og grindin verður býtt út til øll í Norðoyggjum. Hvussu stórur hvør parturin gjørdist, visti vakthavandi ikki at siga, men hann ivaðist ikki í, at nóg mikið skuldi verið til øll.

## Mugu bíða eina viku

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at tónleikabólkurin Frændur skuldi á pall í gjár og í dag. Hetta er tó ikki heilt rætt. Tey, ið vilja hoyra Frændur, mugu bíða til næsta vikuskifti, men tá verða høvini eisini tvey. Fríggjakvøldið spæla teir á Platform. Atgongumerki til hetta tiltaki kunnu keypast í forsølu í Kunningarstovuni í Havn. Leygarkvøldið verða teir so í Fuglafirði í Mentanarhúsinum. Og í sambandi við henda dansin koyra bussar úr Havn, av Strondum, Toftum, úr Sørvági og Vestmanna og heimaftur tá dansurin er liðugur. Byrjað verður klokkan 23.30 og dansurin endar klokkan 3.45.

**-ingrid**

## Prestur við nýggjari bók



*Presturin, Gerhard Hansen, hevur givið út nýggja bók*

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Gerhard Hansen, prestur, búsitandi í Middelfart í Danmark, hevur givið út nýggja bók. Bókin hevur fingið heitið »Liturgisk Andagtsbog - kristen meditation-bibel-læsning og salmesang«.

Bókin verður útgivin undir føroyskum ISBN nummarið, sjálvt um hon verður mest seld í Danmark, og tað er Bókamiðsølan, sum gevur bókina út.

Bókin er at fáa í føroysku bókasølunum og verður væntandi at fáa á føroyskum í heyst.